# Játtanin til Granskingardepilin skerd

**Ein av stovnunum, sum nú merkir, at tíðirnar versna, er Granskingardepilin í Klaksvík. Hann hevur, síðani hann byrjaði í 2000, verið á fíggjarlógini og hevur soleiðis fingið stóran part av fíggingini. Tann inntøkan er nú munandi minkað, tí játtanin til depilin er nógv skerd á fíggjarlógini**

SPARINGAR
*Eydna Skaale*
*Eydna@sosialurin.fo*



*Gestur Hovgaard, leiðari á Granskingardeplinum vísir aftur leysasøgunum um, at depilin er í kreppu. – Vit fara ikki at siga fólki upp fyribils, og vit fara at halda okkum til játtanina, staðfestir hann.*

Gestur Hovgaard, leiðari á Granskingardeplinum, vísir tó aftur, at talan er um nakra kreppu á Granskingardeplinum. – Soleiðis eru korini, tá tú arbeiðir við slíkum sum gransking. Tað er ein óviss vinna. Nú er játtanin skerd á fíggjarlógini, so mugu vit bara royna at finna peningin onkra aðra staðni, sigur Gestur Hovgaard, sum tó sjálvandi heldur tað vera harmiligt, at landið ikki vil stuðla teimum eins nógv longur. Tað krevur nógva orku at leita eftir kapitali og tað vísir seg eisini at verða torførari og torførari at fáa kundar, ið kunnu seta projektpening í stovnin, ásannar hann.

– Tað er sjálvsagt altíð keðiligt, tá peningur knappliga vantar í. Tað skapar ein ávísan óstabilitet fyri arbeiðsfólki, tí tey gerast ósikkur. Tey, sum eru her nú, hava arbeitt í 1-2 ár, greiðir Gestur frá.

Hann sigur tó víðari, at hóast tey nú eru skerd á fíggjarlógini, so eru allar inntøkurnar ikki horvnar hóast tað. Gestur sigur, at inntøkurnar hjá Granskingardeplinum partvís stava frá verkætlanunum, sum tey arbeiða við. – Vit gera ymisk arbeiði, bæði vit einsamøll, men eisini saman við útlendskum granskingardeplum. Tað eru fyritøkur og virki, ið bíleggja arbeiði frá okkum, og soleiðis er ein partur av arbeiðnum sjálvfíggjaður, greiðir Gestur Hovgaard frá. Granskingardepilin er eisini stuðlaður av útlendskum partnarum eins og av eini 30 føroyskum kommunum, sum afturfyri luttaka í ymsu verkætlanunum.

### Uppsagnir

Gestur sigur, at tey í løtuni eru trý fólk, ið arbeiða fulla tíð á Granskingardeplinum. Harafturat eru trý starvsfólk knýtt at stovninum. Tvær deildir eru, ein í Klaksvík og ein í Vági. Høvuðsuppgávan er serliga gransking við atliti til økismenning.

Tað hevur í seinastuni ljóðað, at orsakað av strammaðu fíggjarlógini, verður Granskingardepilin noyddur at skerja talið av starvsfólkum.

Hesum leysatíðindum vil Gestur tó ikki vita av. – Vit fara ikki at siga nakran úr starvi fyribils. Nú fara vit fyrst út at finna vantandi kapitalin onkra aðrastaðni. Í løtuni bíða vit eisini eftir einum møguligum arbeiði. Tað er ein verkætlan, sum vit ætlandi skulu byrja uppá nú í august mánaði, sigur hann.

Gestur sigur, at fyriuttan tað, ið nú brádliga vantaði í orsakað av fíggjarlógarsparingum vantar kapitalur ikki í hjá teimum. – Fólk vilja gjarna hava okkum at vera í eini kreppu, men vit kunnu gott siga, at tann einasti kapitalurin, sum vantar í, er tann, sum júst er strikaður av fíggjarlógini, sigur Gestur. Hann ásannar, at tað í hesum døgum er torført at finna áhugaðar ísetarar, men at tey á Granskingardeplinum ikki eru fallin í fátt enn.

– Tað kann vera, at okkurt av starvsfólkunum ikki fer at kunna halda fram, orsakað av versnandi tíðum, men tað er hinvegin eisini væl møguligt, at eingin verður sagdur úr starvi. Tað veldst alt um, hvussu nógv vit framhaldandi fara at hava at gera. Gestur sigur, at hann merkir eina lítla afturgongd av arbeiði, sum er bílagt av stovnum her í landinum.

Hann staðfestir tó, at hetta eru púra vanlig arbeiðskor, tá ið arbeitt verður innan granskingarøkið. Alt kann henda, tí hetta er ein svikalig vinna, uttan nakrar greiðar reglur.

– Øll vita, at okkurt má henda á økinum, men eingin veit hvat, sigur Gestur.

Hann staðfestir at enda enn einaferð, at Granskingardepilin ikki er í djúpari kreppu, men at hetta heldur er ein keðilig fíggjarstøða, sum tað tó ber til at arbeiða seg úr. Somuleiðis slær hann fast, at Granskingardepilin fer at halda játtanina, hóast hon er skerd.

*Framhald av síðu 7*



*Danin Stig G. Lund var millum fyrilestrarhaldararnar á fakfestivalinum, sum Synergi skipaði fyri fríggjadagin*

*Mynd: Maria Olsen*

felag og Jógvan Philbrow, leiðari í Frítíðarskúlanum í Fuglafirði.

Fyrst fingu luttakararnir fimm minuttir í part, har tey kundu varpa ljós á onkur viðurskifti. Síðani vórðu spurningar og viðmerkingar førdir fram bæði frá pallborðinum og áhoyrarunum.

Pallborðið snúði seg millum annað um, hvørjar hugsjónir politikkararnir hava um frítíðarskúlarnar. Bæði umboðini fyri verandi frítíðarskúlar, sum luttóku á festivalinum, førdi fram, at karmarnir fyri frítíðarskúlunum í Tórshavn og Fuglafirði ikki eru nøktandi. Ann Elisabeth Joensen, leiðari á frítíðarskúlanum í Hornabø segði tó í sínum uppleggi, at munandi batar hava verið at sæð á økinum, men enn er langt eftir á mál.

Heðin Mortensen, formaður í mentamálanevndini í Tórshavnar býráð, segði millum annað, at hann alt fyri eitt fer at seta ein arbeiðsbólk, sum skal greina, hvussu frítíðarskúlin skal víðkast og síggja út í framtíðini.

Hann vísti eisini á, at barnaansingartrupulleikin í Tórshavnar kommunu er við at verða loystur, og so fer betur at bera til at seta fokus á frítíðarskúlarnar. Eisini greiddi hann frá, at í sambandi við nýggjar skúlabyggingar, er tikið hædd fyri frítíðarskúlunum. Hetta opnaði kjakið um, hvørs tað er rætt at frítíðarskúlarnir húsast í skúlunum, tí tá børnini hava fingið frí úr skúlanum er meiningin, at tey ikki skulu vera har meira.

Tosað varð aftur og fram um hetta, men týðuligt var, at partarnir allir vóru samdir um, at óansæð hvat, so skuldu børnini í frítíðarskúlaaldri ikki merkja tað, sum at tey fóru úr einum skúla í ein annan.

### Góð undirtøka

Synergi gjørdi eina kanning, har luttakararnir fingu nakrar spurningar. Millum annað varð spurt um, lærarar eiga at sleppa inn í frítíðarskúlarnar at arbeiða. Til hetta svaraði 66 % nei. Men tá spurningurin varð vendur á høvdi og spurt var, um pedagogar eiga at sleppa inn í fyrstu flokkarnar ella forskúlarnar, svaraðu heili 75 % ja.

Eisini spurdi Synergi luttakararnar, um tørvur er á einum slíkum tiltaki á hvørjum ári. Til hetta svaraðu heili 80 %, at tað halda tey. 18,5 % svaraðu, at tað hevði verið nóg mikið, um ein tílíkur fakfestivalur hevði verðið annaðhvørt ár. Sostatt kann staðfestast, at Synergi hevur rakt seymin á høvdið við at skipa fyri hesum fakfestivalinum.

Frítíðarskúlarnir mugu sigast at vera rímuliga nýggir í Føroyum, og tí er hetta økið kanska nakað ókent fyri mong. Men fakfestivalurin hjá Synergi var kanska ein góð byrjan og gott ískoyti til kjakið um frítíðarpedagogikkin í Føroyum.



# Stórur goymslu-og avgreiðslu-bygningur reistur

**– Við nýggju hølunum verður salt-og fóðurgoymslan savnað á einum staði, soleiðis at umstøðurnar verða betur og arbeiðsligari. Á henda hátt vænta vit eisini at kunna veita eina betri tænastu til feløgini, vit samstarva við og teirra viðskiftafólk, sigur Tórhallur Thomsen**

BYGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Stóri goymslu-og avgreiðslubygningurin hjá P/F Hera Thomsen í Søldarfirði varð reistur mánadagin. Ætlandi stendur bygningurin liðugur at taka í nýtslu 1. oktober*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Mánadagin varð stóri goymslu-og avgreiðslubygningurin, sum P/F Heri Thomsen byggir í Søldarfirði, reistur.

Tórhallur Thomsen sigur, at bygningurin er 63 metrar langur og 25 metrar breiður, og hetta gevur eina gólvvídd, sum er 1630 fermetrar tilsamans.

Hann sigur, at talan er um ein goymslu- og avgreiðslubygning burtur av, og tí fer at kalla øll gólvvíddin til hesi endamál.

– Í bygninginum, sum ætlandi stendur liðugur at taka í nýtslu, 1. oktober, verður saltgoymsla øðrumegin og fóðurgoymsla hinumegin. Ein skilaveggur deilir bygningin í tveir partar.

### Goyma og avgreiða

P/F Heri Thomsen hevur goymsluna, avgreiðsluna og flutningin av Evos-alifóðuri um hendi, eins og felagið eisini hevur um hendi goymslu og flutning av salti, sum íslendska felagið, Saltkeyp, hevur í Føroyum.

– Vit umboða ikki fóður og salt í Føroyum, men syrgja fyri goymslu, avgreiðslu og flutningi fyri tey feløg, sum umboða hesi.

Tórhallur sigur, at sum er, hevur P/F Heri Thomsen goymsluna av fóðuri í einum bygningi, sum Bakkafrost eigur á Glyvrum, meðan saltgoymslan er í niðastu hædd í gamla Turkihúsinum á Skála.

– Við nýggja bygninginum í Søldarfirði vilja vit savna alt á einum staði, soleiðis at umstøðurnar verða betur og arbeiðsligari. Á henda hátt vænta vit eisini at kunna veita eina betri tænastu til feløgini, vit samstarva við og teirra viðskiftafólk.

Hann sigur, at P/F Heri Thomsen flytir Evos-fóðurið úr Noregi við skipunum, sum eita Skurin og Sirius, meðan saltið kemur við bulk-skipi úr Spaniu.

– Saltið kemur leyst, og tað verður eisini goymt í leysum inni í bygninginum. Hinvegin kemur fóðurið í stórum sekkjum – ella í smærri sekkjum á plattum.

Umframt at goyma og avgreiða fyri Evos og Saltkeyp, sigur Tórhallur, at bygningurin í Søldarfirði eisini verður karmur um kraftfóðurgoymslu hjá MBM.

– Á henda hátt kunnu viðskiftafólk hjá MBM, sum áður keyptu kraftfóður í Kollafirði, nú keypa hesar vørur í Søldarfirði, tá ið avgreiðslan letur upp seinni í heyst.

### Tvey fólk

Tórhallur sigur, at tvey fólk burtur av fara at starvast í avgreiðsluni í Søldarfirði, men tá ið lossað verður, verða einir fimm mans í sjálvari lossingini.

– Tað verða fólk hjá okkum, sum koma at taka sær av avgreiðslu, lossing og flutningi. Við at savna alt hetta virksemi undir einum taki, meta vit, at hetta arbeiði verður gjørt so effektivt sum tilber, sigur Tórhallur Thomsen.

Í stóra goymslubygninginum í Søldarfirði verður avgreiðsluskrivstova, kaffistova og wc'ir, men annars verður allur bygningurin brúktur til goymslubygning.

Spurdur, hvussu stór íløgan er, sigur hann, at talan er um einar 4 miljónir krónur.

– Vit hava rættiliga spískað okkum blýantin fyri at fáa hendan bygningin upp at standa so bíliga og skilagott sum gjørligt, sigur Tórhallur Thomsen.

# Tveir nýggir næmingar í Funningsfirði



*Her eru Rebekka Rasmussen og Torkil Hansen fyri fyrstu ferð á veg í skúla*

*Mynd: Liss Joan Hansen*

**Sjey næmingar ganga í løtuni í barnaskúlanum í Funningsfirði, sum Funningsfjørður og Elduvík eru saman um**

SKÚLI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tá ið skúlarnir byrjaðu aftur mánamorgunin, fóru tvey børn fyri fyrstu ferð í skúla í Funningsfirði. Børnini eru Torkil Hansen og Rebekka Rasmussen, sum bæði búgva í Funningsfirði.

Funningsfjørður og Elduvík, sum enn eru ein kommuna, eru saman um skúlan í Funningsfirði, men í ár er eingin næmingur úr Elduvík í fyrsta flokki.

Lærarin við barnaskúlan í Funningsfirði eitur Emil Jacobsen og er av Skála.

### Sjey børn

Í ár eru sjey skúlabørn í Funningsfirði. Fimm eru úr Funningsfirði og tvey úr Elduvík.

Tvey børn eru í fyrsta flokk, tvey í øðrum flokki, tvey í triðja flokki og ein næmingur er í fjórða flokki.

Skúlin í Funningsfirði tekur næmingar upp til og við sjeynda flokk, men eingi børn eru í løtuni í fimta, sætta og sjeynda flokki.

Tá ið næmingarnir fara úr sjeynda flokki, fara teir á framhaldsdeildina í Runavíkar skúla – og í løtuni ganga tveir næmingar úr Elduvíkar kommunu í níggjunda flokki í Runavík.



*Rebekka og Torkil saman við lærara sínum, Emil Jacobsen*

*Mynd: Liss Joan Hansen*